Almanna- og Heilsumálaráðið

# Fulltrúi til Almanna- og heilsumálaráðið

Eitt starv sum fulltrúi í Almanna- og heilsumálaráðnum er leyst at søkja til setan 1. januar 2007, ella eftir nærri avtalu.

**Um starvið:**
Talan er um eitt starv á fíggjardeildini, har tú fyrst og fremst kemur at ansa eftir, og hava umsjón við útreiðslunum til serviðgerð uttanlands og at ráðgeva stovnsleiðslum um fíggjarviðurskifti. Harumframt kemur tú at vera við til at gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum innan Almanna- og heilsumálaráðið.

Serviðgerð uttanlands eru tær útreiðslur, sum landið hevur í samband við, at sjúklingar verða sendir av landinum til viðgerðar, í flestu førum niður til Danmarkar á Ríkissjúkrahúsið.

Starvið er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við hini starvsfólkini í ráðnum. Starvið er sjálvstøðugt, og góðir møguleikar eru fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

Fyri framman standa nógvar stórar avbjóðingar viðvíkjandi fíggjarstýringini í Almanna- og heilsumálaráðnum. Gongd skal setast á, at tað almenna fer at arbeiða við mál og avriksstýring, sum er ein stór og spennandi avbjóðing fyri Almanna- og heilsumálaráðið.

**Førleikakrøv:**
Viðkomandi búskaparfrøðilig útbúgving frá hægri lærustovni, góðan teldukunnleika, umframt royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum og hagtølum.
Starvsroyndir frá miðfyrisitingini er ein fyrimunur.
Harumframt vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**Umsókn** við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

***Almanna- og heilsumálaráðið***
***Eirargarður 2***
***FO 100 Tórshavn.***

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. desember 2006. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, tlf.nr. 30 40 50 ella teldupost: turid@ahr.fo, har eisini møguleiki er at biðja um starvslýsing.

---

Almanna- og heilsumálaráðið umsitur almannamál, heilsumál, og bústaðarmál. Tað starvast í løtuni 32 fólk í ráðnum. Uppgávan hjá Almanna- og heilsumálaráðnum er í høvuðsheitinum at ráðgeva landsstýrismanninum, at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur og at veita stovnum undir ráðnum ráð og vegleiðing. Hvørjar uppgávur Almanna- og heilsumálaráðið røkir sæst eisini á heimasíðu okkara www.ahr.fo

**Vit draga eina línu** **Vit seta skynsemi í hásæti**
**Vit vilja vita** **Vit bróta slóð**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

VESTMANNA KOMMUNA

# Útbjóðing

Vestmanna Kommuna bjóðar við hesum út alment vegarbeiðið við longjan og umbygging av Fjalsvegi í Vestmanna.

Arbeiðið fevnir um spreinging, avgrevstur og uppbygging av 354 m av vegi við tilhoyrandi tekniskum installatiónum til og við planering við forknústum tilfarið.

Vegarbeiðið er á tveimum teinum. Statión 0 til 160 er lækking og umbygging av íbinding í Ovara Veg. Statión 430 til 624 er leingjan av vegi.

Arbeiðsfrágreiðing og tilboðslisti kunnu heintast á **www.vestmanna.fo** Útbjóðingartilfar kann bíleggjast hjá Vestmanna kommunu í seinasta lagi hósdagin 14. desember 2006 móti veðhald 3.000 kr., sum verður at rinda í krossaðum kekki ella inn á konto í Føroya Sparikassa nr. 9181-1230974 ella konto í Føroya Banka 6460-1106289.

Licitatiónin verður hjá teknisku deild í Vestmanna kommunu týsdagin 9. januar 2007 kl. 14.00. Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

**Vestmanna Kommuna**
Bakkavegur 16
FO-350 Vestmanna
Telefon +298 470 115
Telefax + 298 470 113
e-mail: **vestmanna@vestmanna.fo**
**www.vestmanna.fo**

## Starv í Føroya Skúlabókagrunni

Eitt starv í Føroya Skúlabókagrunni verður lýst til setanar sum skjótast og ikki seinni enn 1. januar 2007.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til føroyska skúlaverkið. Ein partur av starvinum verður at standa fyri arbeiðinum at útvega tíðarbærar teldutøkar undirvísingarmiðlar. Upplæring kann verða neyðug.

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, dyggur fakligur førleiki, hollur kunnleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Føroya Skúlabókagrunni í hendi ikki seinni enn mikudagin 20. desember 2006. Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá Helenu Dam á Neystabø, á telefon 31 61 00

**Føroya Skúlabókagrunnur**
Lützenstrøð 4
FO-100 Tórshavn

Sosialurin
www.sosialurin.fo




Forlagið Hellurnar gevur triðja árið á rað út bók. Hesa ferð eitur bókin *„900 dagar í Singapore“* og fevnir um teir 900 dagarnir, høvundurin **Jústinus Leivsson Eidesgaard** starvaðist í Singapore frá august 1996 og fram til januar 1999.

Hetta tíðarskeið vóru hjúnini Poula og **Jústinus Eidesgaard** savningarstaðurin hjá teimum mongu føroyingunum, sum vitjaðu Singapore, serliga sjómenn, men eisini vanlig ferðandi. Fleiri litmyndir prýða bókina millum annað við skipavitjanum og føroyingum í Singapore.

Bókin er skrivað í tveimum høvuðsløgum og einum triðja, sum av og á kemur til sjóndar. Beinagrindin eru útisetabrøvini, sum høvundurin skrivaði heim til landsmenninar, og sum vóru lisin upp í útvarpinum. Hesi vóru sera væl móttikin heima. Hetta er fyrsta lagið, næsta lagið er søgan um Singapore fram til loysing í 1965. Tað er grundarlagið fyri, at landið, sum er minni enn Føroyar og telur yvir 3 milliónir íbúgvar, er heimsins fjórríkasta land, og hevur lyft seg út triðja heiminum og inn í fyrsta eftir einum ættarliði. Triðja lagið eru eygleiðingarnar, høvundurin gjørdi, nú hann vitjaði aftur í fyrst í hesum árinum.

Bókin vísir eisini føroyingum, at smáar tjóðir kunnu røkka ovastu rók.

www.foroyaprent.fo



Ovaragøta 1, 188 Hoyvík, Tel. 322800 ella 223143
justinus@post.olivant.fo, www.hellurnar.com

**Forlagið Hellurnar**
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard